TILTØK

Frelsunarherurin, Tórsgøta 19
Leygardagink l. 11 Útifundur – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 møti, Finngerð Olsen talar. Børn kl. 17.30, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Á møtinum luttaka umboð fyri OM. Ongin sunnudagsskúli. Um viðrar verður sunnudagsskúlaútferð. Farið verður frá Hebron kl. 14.00.
www.hebron.fo

Lívdin
Í Hoyvíkar skúla
(inngongdin er flutt til nýggjaskúla)
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jens Wang um evnið: Truplir spurningar úr Bibluni »Hví gav Gud menniskjanum ein frían vilja?«
Á tilbiðjunarmøtinum kl. 12, luttaka Høgni og Shamila Johannesen.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtinum.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Heimasíðan: www.livdin.fo

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladyslw Zdunek presti, í Mariukirkjuni.

Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ fam. Brend, evnið: Missión. Útimøti á Vaglinum kl. 22 – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum.
Mikumorgun kl. 7 Bønarmøti.

Frá Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl.18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti v/ Rúna Rasmussen, evnið er: »Tú kanst gera ein mun«.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta (seinasta áðrenn summar), ABC v/ Ása Lutzen, evnið er: Reinsan við bløði Jesusar 1. partur, kl. 16 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti við Evangh., Meinigheitini í Hoyvík og Rhema í Evangeliihúsinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mána-frí frá kl. 6-18.
www.filadelfia.fo

Samkoman Rhema
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum. www.rhema.fo

Missiónshúsið við Landavegin
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Sigurd Sørensen.

Meinigheitshúsið
Friggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúlin fer útferð, kl. 18 Útimissiónsmøti v/ Hera og Maluni Kjærbo. Manskórið syngur.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Konfirmantar í heyst
Konfirmantarnir í heyst í Vesturkirkjuni og Argja kirkju verða skrivaðir inn í Vesturkirkjuni friggjadagin 18. juni kl. 15.00. Havið dópsella navnabræv við. Markið millum vestara og eystara prestagjald er Tróndargøta, Dalavegur og Villingardalsvegur.

Saron, Vestmanna
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 18 við Fríðbjørn Poulsen. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

Vestmanna missiónshús
Sunnudagin kl. 19 Sangløta við Magna Christiansen og tónleikarum úr Vestmanna, Thominu og Kajberg Davidsen av Skála.

Vakhús í Sandavágí
Leygardagin kl. 20 Evangel. møti.
Sunnudagin kl. 15.30 Útimøti – um viðrar. Kl. 18 Evangel. møti. Herman og Gigga syngja, Tórmund og fleiri.

Miðvágs missiónshús
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, um viðrar verður skipað fyri útferð. Kl. 18 Møti/meinigheitsfundur. Aftaná verður felagsnátturði. Hjartaliga vælkomin.

Hvalvíkar missiónshús
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti v/ Finnur Hansen o.fl.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Tjørnuvík/Vík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Bønhúsið í Søldarfirði
Sunnudagin kl. 11 Lestur, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Petur J. Petersen, Saltnes. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Berøa, Saltangará
Sunnudagin kl. 11.30 Morgunmøti og Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, toftafólk luttaka við sangi og talu. Aftaná verður nátturði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Farið verður útferð við sunnudagsskúlanum sunnudagin 20. juni – um viðrar – annars verður vanligur sunnudagsskúli, møtast í Meinigheitshúsinum kl. 13.30.

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Dánjal Petersen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula Høj, kl. 11 Barnamøti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

Missiónshúsið í Oyndarfirði
Sunnudagin kl. 16 Møti v/ John Myllhamar og Ólavi Jacobsen.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Frants Jensen, kl. 21 Ungdómsmøti, heimligar kreftir.

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Jakku Mýru. Ungdómsmøti kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Getsemane, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnaløta fyri ung.
Sunnumorgun kl. 11 Møti við Poul Nicolai Steinberg.

Soli Deo Gloria
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sands missiónshús
Sunnudagin kl. 10.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Terji, Egin og Sølvi syngja.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagsskúlin er farin í summarfrí. Sunnukvøldið kl. 18 Møti við kórinum. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Drekkamuður verður aftaná møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Porkeri
Sunnukvøldið kl. 18 Møti har Streingjakórið luttekur. Hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Nimrod og Ebba luttaka við sangi, Nimrod Midjord talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin. Mánakvøld kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert hjartaliga vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-friggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 14. juni
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin, tlf. 316491.
Tilmelding til Sandstúrin 28.-29. juni á tlf. 316491.
Tilmelding til urtagarðstúrin mikudagin á tlf. 316491
Týsdagur 15. juni
kl. 10-11.30 Sangur v/ Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15-17 Opið hús
Mikudagur 16. juni
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Urtagarðsvitjan, Michael Jacobæus, gartnari, tilm. 316491
Hósdagur 17. juni
kl. 10-10.30 Summarfimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen, Hugnaløta
Fríggjadagin 18. juni
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 20. juni verður gongutúrur Vestmanna-Goturshálsur-Ærgisá. Túrurin er hampuliga lættur, men gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

Eysturoyar Gongufelag
Gongutúrur verður sunnudagin 20. juni. Gingið verður úr Miðvági til Bøssdalafoss og síðani til Vatnsoyrar. Vit møtast við politistøðina í Miðvági kl. 14.00. Tilmelding ikki neyðug. Túrurin er lættur. Hav stav við.

Tilhaldið Hugnin í Sandoynni
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 16. juni
Vit spæla Boccia í Ungmannafelagshúsinum Virkinum. Vit møtast kl. 14. Byrjað verður við løttum fimleiki, so spæla spælir reyða liðið móti tí bláa liðnum.

Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar
í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensiónistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadagfríggjadag kl. 15-18.
Mánadagin 14. juni
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
Týsdagin 15. juni
Ítriv fyri áhugað
Mikudagin 16. juni
Videoupptøka av Havnatúrinum
Hósdagin 17. juni
Boccia v/ Jóhan Danielsen
Fríggjadagin 18. juni
Opið hús

Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, sumuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.

Dagtilhaldið í Vági
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

Vágs Pensionistafelag
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur límafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

Spælistovan í meinigheitshúsinum
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og friggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

NA (Anomymir narkomanar)
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru friggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Fyribyrgingarráðið
Argjaboðagøta 7 · 160 Argir postrúm 135 · 110 Tórshavn
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Heilafelagið
felagið fyri apopleksi- og afasirakt
Íslandsvegur 10 · tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

Javni
Hoydalsvegur 40 · 3 hædd
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo
og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

FILMSTEIGURIN

Aftur til Cold Mountain

Harða og blóðuga borgarakríggið hevur sett síni merki í Amerika. Eisini hjá teimum b´ðuðm, Inman, sum er hermaður, og ungu vøkru Ada Monroe.

Heima í Cold Mountain bíðar hon í vónini eftir, at Inman kemur óskalaður heim, men samstundis hevur hon sítt at síggja til, eftir at pápin lat lív. Til at fáa skil á garðin, fær hon hjálp frá Ruby, sum á síni fjakkaraferð kemur framvið, og vinarlagið teirra millum verður sterkt.

Eftir at kríggið aftur tekur dik á seg, ger Innman tó av rýma. Hann vil heim til Cold Mountain, men tað er ikki bara sum at siga tað. At rýma undan hernaðarskylduni verður ikki tikið væl upp, og eisini í Cold Mountain hevur herurin síni fólk.

Prinsurin og eg

Paige gongur á universitetinum í Wisconsin, og hon er púra avgjørd í sínum ætlanum. Fyrst skal hon útbúgva seg til lækna, og síðani skal hon starvast fyri Læknar uttan landamørk. Edvard hinvegin hevur ikki so stórar ætlanir við lívi sínum, men tað nýtist honum heldur ikki. Hann skal nevnliga gerast danskur kongur, tá tíðin er komin til tað. Konufólk og skjótir bilar gera tó sítt til, at kongshúsið ber ótta fyri krúnprinsinum, og tí ger pápin at enda av, at hann skal á universitetið í Wisconsin.

Her átekur Edvard sær fyri fyrstu ferð leiklutin sum ein púra vanligur drongur. Fyri at eingin skal vita, hvør hann er, broytir hann navn til Eddie, og hann fær eisini starv í kantinuni, har hann hittir Paige. Fyrst tykjast tey ikki at trívast so væl saman, men so við og við gerst greitt, at teimum dámar hvønn annan. Paige hevur sum so ongantíð havt nakran dreym um prinsin á hvíta hestinum, men nú hevur hon danska krúnprinsin, og hvat man hetta gera við framtíðarætlanir hennara?



Frumsýning
Fríggjadagin 18.06. kl. 22[45] Leygardagin 19.06. kl. 22[45]
Sunnudagin 20.06. kl. 22[30]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo



Frumsýning
Fríggjadagin 18.06. kl. 21[00] Leygardagin 19.06. kl. 21[00]
Sunnudagin 20.06. kl. 19[45]



Billettprísur: 70,- kr.
Fríggjadagin 18.06. kl. 16[15] Fríggjadagin 18.06. kl. 19[30]
Leygardagin 19.06. kl. 16[15] Leygardagin 19.06. kl. 19[30]
Sunnudagin 20.06. kl. 16[00] Sunnudagin 20.06. kl. 19[15]

Fríggjadagin 18.06. kl. 18[30] Fríggjadagin 18.06. kl. 23[30]
Leygardagin 19.06. kl. 18[30] Leygardagin 19.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 20.06. kl. 17[00] Sunnudagin 20.06. kl. 22[15]